HEILSUMÁLARÁÐIÐ

21. juli 2015
Mál: 15/00152-7
Viðgjørt: BL

**Uppskot**
**til**
**kunngerð um endurvenjing innan sjúkrahúsverkið**

Við heimild í § 6a, stk. 4 í løgtingslóg nr. 64 frá 17. Mai 2005 um sjúkrahúsverkið, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 68 frá 22. mai 2015 verður ásett:

**§ 1.** Sjúkrahúsverkið veitir ókeypis endurvenjing til sjúklingar, sum hava ein læknafakliga grundaðan tørv á endurvenjing.

**§ 2.** Endurvenjing innan sjúkrahúsverkið fevnir um fyriskipaða og miðvísa venjing, bæði fysiskt og kognitivt, við tí endamáli, at sjúklingurin í størst møguligan mun kann endurvinna sínar mistu førleikar.
*Stk. 2.* Endurvenjing er tíðaravmarkað veiting, sum endar, tá staðfest verður, at líkindi ikki longur eru fyri, at førleikarnir kunnu batna munandi við framhaldandi endurvenjing.

**§ 3.** Endurvenjing verður veitt, tá ið sjúkrahúslækni hevur staðfest ein tørv á endurvenjing, og byrjar, so skjótt sum tað er ráðiligt í mun til heilsustøðuna hjá sjúklinginum.
*Stk. 2.* Umframt at taka støðu til tørv á endurvenjing hjá sjúklingum, ið eru innlagdir á sjúkrahúsi, kann sjúkrahúslækni eisini taka støðu til tørv á endurvenjing hjá sjúklingum, ið hava ambulantan tørv á endurvenjing.
*Stk. 3.* Sjúkrahúslækni tilnevnir eitt heilsustarvsfólk at hava ábyrgdina av at samskipa enduvenjingartilboðið til sjúklingin.

**§ 4.** Í sambandi við, at endurvenjing verður veitt, skal sjúkrahúsverkið bjóða sjúklinginum eina endurvenjingarætlan.
*Stk. 2.* Endurvenjingarætlanin skal vera skrivlig og skal verða gjørd í samráð við sjúklingin og møgulig avvarðandi.

**§ 5.** Í endurvenjingarætlanini skal m.a. vera upplýst:
a) Frágreiðing um førleikar, herundir mistar førleikar hjá sjúklinginum,
b) Innihaldið í endurvenjingartilboðnum,
c) Hvat endurvenjingin miðjar ímóti í ítøkiliga førinum,
d) Hvør samskipar arbeiðið við endurvenjingini,
e) Hvør luttekur í endurvenjingini,
f) Nær endurvenjingin skal byrja, og
g) Nær endurvenjingin væntandi endar.

**§ 6.** Sjúklingurin skal í seinasta lagi við útskrivan av sjúkrahúsi ella tá ið ambulanta sjúkrahúsendurvenjingin er liðug, fáa endurvenjingarætlanina. Harumframt skal endurvenjingarætlanin, eftir avtalu við sjúklingin, sendast avvarðandi kommunu, Almannaverkinum ella øðrum sjúkrahúsi, um endurvenjing skal halda áfram har.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: hmr@hmr.fo

*Stk. 2.* Endurvenjingin eftir útskrivan av sjúkrahúsi verður veitt við støði í endurvenjingarætlanini.

**§ 7.** Sjúkrahúsverkið endurskoðar og dagførir endurvenjingarætlanina við hóskandi millumbilum, til sjúklingurin hevur endurvunnið sínar mistu førleikar.

**§ 8.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Heilsumálaráðið, xx. august 2015

**Karsten Hansen**
landsstýrismaður

/Turid Arge